Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Hestleiðin og ætlanirnar eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu

Spurningar:

1. Hvussu metir landsstýrismaðurin tænastuna vera á Hestleiðini í løtuni, og hvussu grundgevur hann fyri teimum skerjingum, ið eru gjørdar seinastu árini?

2. Hví møtti landsstýrismaðurin ikki á fundi hjá Útoyggjafelagnum um støðuna og framtíðina á Hestleiðini?

3. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at betra tænastuna á Hestleiðini og at samskifta við fólkið í Hesti um tørv og møguleikar?

4. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin fyri Hestleiðina eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu?

Viðmerkingar:
Støðan og tænastan á Hestleiðini er broytt fleiri ferðir seinastu árini, og tænastan er skerd hjá Hestfólki.

Lítið alment orðaskifti er um støðuna, hóast royndir frá Hestfólki at fáa ljóð fyri sjónarmiðum sínum. Á fundi um málið, sum Útoyggjafelagið bjóðaði avvarðandi politikarum og myndugleikum til um Hestleiðina, møtti stjórin á Strandferðsluni, men hvørki borgarstjórin í Havn ella landsstýrismaðurin í fíggjarmálum møttu upp.

Nú nærkast eisini tann stóri dagur, har Sandoyartunnilin verður tikin í nýtslu, sum øll fegnast um. Men Hestfólk hava onga ábending fingið frá landsstýrinum um, hvat skip og hvør tænasta verður á Hestleiðini, tá ið Sandoyarleiðin verður niðurløgd.

Til tess at varpa ljós á støðuna, fáa betrað tænastuna og at fáa eina greiða ætlan fyri Hestleiðina, eftir at Sandoyartunnilin letur upp, verður fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 8. oktober 2021

Høgni Hoydal